# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit vórðu ávaraðir og høvdu sett tiltøk í verk, man hasum álopinum kundu vit ikki forðað kortini*
*(indiskur hotelleigari)*

# Allir yvirgangsmenn vóru úr Pakistan

**Indisku myndugleikarnir siga, at allir menninir, sum vóru við í álopinum í Mumbai, vóru úr Pakistan**



*Ajmal Qasah er tann einasti av teimum tíggju yvirgangsmonnunum, sum er á lívi*
*(Mynd: Reuters)*

- Allir yvirgangsmenninir, sum doyðu í bardøgunum í Mumbai, vóru úr Pakistan, segði stjórin í indiska innanríkisráðnum, Shakeel Ahmad, við bretska kringvarpið BBC í morgun. Hann legði afturat, at India skuldsetir ikki pakistonsku stjórnina fyri at hava stuðlað yvirgangsmonnunum.

Samstundis hava indisku myndugleikarnir upplýst, at 172 fólk doyðu í yvirganginum, og at næstan 300 vórðu særd.

Indiska tíðindastovan PTI skrivaði í gjár, at fleiri limir í indisku stjórnini hava hug at slíta friðarsamráðingarnar við Pakistan. PTI visti eisini at siga, at Manmohan Singh, forsætisráðharri, er sera vónsvikin av, at Pakistan ikki ger meiri fyri at forða yvirgangi ímóti India.

Ajmal Qasab, tann einasti yvirgangsmaðurin, sum bleiv tikin á lívi, er úr Pakistan, og sambært indiskum keldum hevur hann greitt løgregluni frá, hvørjir felagar hansara vóru. Hann skal eisini havt sagt, at hann var í venjingarlegu hjá pakistanska felagsskapinum Lashkar-e-Taiba, sum berjist ímóti tí indiska stýrinum í Kashmir.

Pakistanski forsetin, Asif Ali Zardari, hevur inniliga heitt á India um ikki at revsa Pakistan fyri atsóknina at Mumbai. Hann segði í gjár, at teir hernaðarligu felagsskapirnir í økinum eru so sterkir, at teir kunnu elva til kríggj millum londini bæði.

- Vit liva í einari truplari tíð, har óalmennar kreftir hava elvt til kríggj sum t. d. atsóknin at USA 11. september í 2001, segði Zardari. Hann hevur fyrr sagt, at Pakistan fer at revsa teir seku, um tað kann prógvast, at nakar í Pakistan hevði samband við yvirgangin í Mumbai.

# 88 tóm flogfør úr Bangkok



*Flogførini sleppa á flog úr Bangkok, men tey eru tóm*
*(Mynd: Reuters)*

**Mótmælisfólkini í Teilandi eru gingin við til at lata 88 flogfør sleppa úr Bangkok, men eingi ferðafólk sleppa við**

Eftir avtaluni millum mótmælisfólkini hjá frælsisfylkingini PAD og stjórnina kunnu flogfør hjá teilendska flogfelagnum Thai og útlendsk flogfør fara til floghavnir aðrastaðni í landinum eftir ferðafólki.

Øll flogferðsla til og úr Bangkok hevur ligið still, síðani fleiri túsund mótmælisfólk otaðu seg inn í floghavnina, har tey hava verið síðani. Myndugleikarnir hava lovað, at útlendsk ferðafólk, sum bíða eftir at sleppa av landinum, skulu sleppa heim sum skjótast. Samstundis hava myndugleikarnir bjóðað ferðafólkunum einar 350 krónur um dagin, meðan tey bíða eftir heimferð.

Weerasak Kohsurat, sum er ráðharri í ferðavinnumálum, segði í morgun, at umleið 100.000 ferðafólk og handilsfólk bíða eftir at sleppa úr Teilandi. Flogfeløgini siga, at tað kann taka eina viku at avgreiða tey mongu, sum bíða.

# Russar biðja Interpol um hjálp í drápsmáli

**Russisku myndugleikarnir vilja nú hava Interpol at taka mannin, sum myrdi tíðindakvinnuna Onnu Politkovskaja**



*Anna Politkovskaja bleiv myrd í Moskva*
*(Mynd: Polfoto)*

Russiska ákæruvaldið sigur seg vita, hvør tað var, sum myrdi blaðkvinnuna Onnu Politkovskaja uttan fyri íbúð hennara í Moskva á heysti í 2006, og nú hevur ákæruvaldið biðið Interpol taka mannin.

- Vit vita, hvør framdi illgerðina, og altjóða løgreglan hevur givið boð um, at hann skal takast, segði ákærin Juri Tjajka við almenna russiska sjónvarpið í gjár.

Ákæruvaldið í Moskva hevur skuldsett fýra menn fyri at hava hjálpt drápsmanninum. Ein av teimum skuldsettu er fyrrverandi agentur hjá fregnartænastuni, og ein annar hevur fyrr arbeiðyt hjá russisku kriminalløgregluni. Enn hevur ákæruvaldið ikki sagt, hvør framdi sjálvt morðið.

Anna Politkovskaja, sum arbeiddi hjá blaðnum Novaja Gazeta, var kend fyri sínar hvasorðaðu greinar um russisku krígsførsluna í Kekenia. Hon bleiv skotin tann 7. oktober í 2006.

## STUTT SAGT

### Mamma Shannon játtar seg seka



*Shannon bleiv fjald fyri finningarløn, men tað miseydnaðist*
*(Mynd: Reuters)*

Í Bretlandi hevur Karen Matthews nú viðgingið, at hon var vitandi um, at dóttir hennara, Shannon Matthews, bleiv fjald heima hjá einum manni, sum hon kendi, meðan løgreglan setti umfatandi leiting í verk eftir gentuni.

Í rættinum segði Karen Matthews, at hon ræddist Michael Donovan, sum fjaldi dóttir hennara. Tey bæði kendust, tí Michael Donovan og fyrrverandi sambúgin hjá Karen Matthews, Craig Meehan, sum er pápi Shannon, eru vinmenn. Sambært Karen Matthews var tað Michael Donovan, sum fekk hugskotið at fjala gentuna fyri síðani at fáa finningarløn, men løgreglan helt uppá, at mamman var uppi í ætlanini, og tað hevur hon nú viðgingið, sigur Sky News.

Løgreglan sendi stór lið at leita eftir Shannon Matthews, tí sambært fjølmiðlunum vildu myndugleikarnir ikki hava eitt mál afturat sum tað um Madeleine McCann, ið hvarv í Portugal.

### Talsmaður fallin

Dr. Mohammad Hanif, fyrrverandi talsmaður hjá Taliban í Afghanistan, er deyður. BBC sigur, at hann doyði í einum álopi um vikuskiftið, og at álopsmenninir vóru í sama hermannabúna, sum tann afghanski stjórnarherurin brúkar.

Dr Hanif var almennur talsmaður hjá Taliban frá oktober í 2005, til hann bleiv tikin í fjør. Hann bleiv latin leysur í vár. Afghanska herleiðslan sigur, at herurin hevði einki við álopið at gera.